# ú verður sildin skorin til flak



Jupiter landar sild í Kollafirði, sum verður skorin til butterfly-fløk og seld á norðurevropeiska marknaðinum serliga til Týsklands
Mynd: Jens Kr. Vang

verið á hvørji vaktini, síðan Saksaberg og seinni Jupiter landaðu.

Vaktirnar eru frá klokkan 8 á morgni til klokkan 20 á kvøldi og aftur frá klokkan 20 til klokkan 8.

Arbeitt hevur eisini verið í vikuskiftinum á sama hátt sum hinar dagarnar.

Umráðandi er at fáa sildina undan, meðan hon er fesk.

Sum er, hevur pelagiska virkið í Kollafirði nóg mikið av fiski fram til hósdagin.

**Upplæring**

Ein maskinmaður hjá virkinum hevur verið til upplæring í Danmark í tríggjar vikur, har hann hevur sett seg inn í, hvussu baader- maskinurnar verða justeraðar.

Á virkinum vænta tey, at hampiligar nøgdir verða avskipaðar longu í hesi vikuni.

Hetta er soleiðis ein spennandi tíð hjá teimum, sum standa aftanfyri Kollafjord Pelagic – og ikki minni hjá teimum, sum nú starvast í dagligu framleiðsluni á virkinum.

Stjóri á Kollafjord Pelagic er vestmenningurin, Dánjal Jákup Andreasen.

*Arbeiðið hevur gingið væl, síðan tey burtur av fóru at skera sild í Kollafirði fyri nøkrum døgum síðan*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

